

# Leiðari til Statoilstøðina í Gundadali

Hevur tú evnini og førleika at leiða eina av okkara størstu Statoilstøðum, hevur tú nú møguleikan at søkja spennandi og avbjóðandi leiðarastarvið á Statoilstøðini í Gundadali.

### *Arbeiðið umfatar m.a:*

- dagligu leiðsluna av Statoilstøðini
- at leiða og menna starvsfólki
- at tryggja at tænastan altíð er góð
- at tryggja at vørur altíð eru á hyllunum

Tú verður partur av einum leiðaratoymi av 12 Statoilstøðum kring landið.

20 fólk eru knýtt at Statoilstøðini í Gundadali. Tú hevur tilvísing til sølu- og marknaðarleiðaran á Statoil Føroyar.

### *Umsøkjarin:*

Fyri at kunna røkja starvið best møguligt, rokna vit við, at:

- tú hevur útbúgving og/ella royndir innan detailhandil ella líknandi.
- ert fyrikomandi
- hevur góð samstarvsevnir
- er tænastusinnað/ur
- kann arbeiða sjálvstøðugt

### *Vit bjóða:*

Eitt avbjóðandi starv við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.

Møguleikar eru fyri at luttaka á skeiðum.
Lønin verður sett eftur royndum og útbúgving.
Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

### *Umsóknir:*

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 16. februar og skulu sendast til:

P/F Mentir (Statoil Føroyar)
Postboks 3098, 110 Tórshavn
frámerki "Leiðari til Statoilstøðina í Gundadali"
ella við telduposti til hwa@statoil.fo

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Hans Waag, sølu- og marknaðarleiðara á tel 34 35 35.

Allir umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

*Endamálið hjá Statoi Føroyar er at veita brúkarunum kring Føroyar oljuúrdráttir, og eitt nevt og gott vøruúrvæl. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu, eins og umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av okkara fremstu málum. Fyri Statoil arbeiða umleið 150 fólk.*

STATOIL

sansir.fo



*P/F Supply Service*

*FO-520 Leirvík*
*Faroe Islands*

*Tel +298 61 49 00*
*Fax +298 44 33 49*
*www.supplyservice.fo*

## SKRIVSTOVUFÓLK TIL P/F SUPPLY SERVICE

P/F Supply Service í Leirvík søkir eftir skrivstovufólki til fulltíðarstarv at byrja skjótast gjørligt.

Høvuðsarbeiðsuppgávur:

- Allar vanligar bókhaldsuppgávur
- Lønaravrokning
- Telefonavgreiðsla
- Vanligt skrivstovuarbeiði

Førleikakrøv:

- Hóskandi útbúgving og royndir á økinum
- Kunnleiki til bókhaldsskipanina Navision ella líknandi skipan er ein treyt
- Góður kunnleiki til føroyskt og enskt mál

Persónligir eginleikar:

- Evni at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum
- Álítandi og fyrikomandi

Løn:
Lønin verður ásett eftir avtalu við atliti at royndum og útbúgving.

Virkisøkið:
Virkisøkið er P/F Supply Service og onnur atknýtt feløg innan fiskivinnu, fastogn o.a. Arbeiðsstaðurin er í Leirvík.

Umsóknir:
Sendið skrivliga umsókn við avritum av prógvum og viðkomandi skjølum til:

P/f Supply Service
Kulibakki 8
Postboks 59
520 Leirvík

Umsóknarfreist:
Umsóknarfreistin er fríggjadagin, 13. februar 2009.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Eru spurningar um starvið, vinarliga ringið til Sólruna Poulsen á tel. 614900.

Um P/F Supply Service
P/F Supply Service er offshoreparturin av samtakinum P/F Sjóborg, ið hevur rikið reiðaravirksemi síðan 1970. Felagið byggir í løtuni tríggjar nýbygningar av slagnum Havyard 832 CD. Skrivstovan hjá P/F Supply Service er í Leirvík og er góðkend við ISO 9001, ISO 14001 og OHSAS 18001.

SENDISTOVAN